tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2017 |
| Fundardagur | 9. januar 2017 kl. 17:00-18:05 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Kristina Kambskarð Sørensen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen (Anita Vibergsdóttir burturstødd)

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

**Pkt. Tekstur** **Síða**


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattainntøkur 2016 | 2 |
| 2 | Ásetan av fundardøgum 2017 | 2 |
| 3 | Støðutakan til skrivstovuhøli hjá Sernám í Suðuroynni | 4 |
| 4 | Val av limum í felags barnaverndarnevndina | 5 |
| 5 | Kunningarfundur um tilbúgvingina og raksturin av Suðuroyar Sjúkrahúsið | 5 |
| 6 | Mentanarvirðisløn Landsins handað á Tvøroyri 25. januar 2017 | 6 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2017 |
| Fundardagur | 9. januar 2017 kl. 17:00-18:05 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-1-16**

## 1. Skattainntøkur 2016

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar 2016.

### Skjøl

- Skattur 2016.xlsx
- Samanbering av skatti 2015-2016, desember

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

**00.22.04-A00-1-17**

## 2. Ásetan av fundardøgum 2017

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin hevur gjørt uppskot til fundardagar hjá Býráðnum, fíggjarnevndini og nevndum annars fyri 2017. Uppskoti er soljóðandi:

**Fíggjarnevndarfundir**

Tórsdag, 5. januar kl. 13:00
Mánadag, 6. februar kl. 08:30.
Mánadag, 6. mars kl. 08:30.
Mánadag, 3. apríl kl. 08:30.
Mánadag, 1. mei kl. 08:30.
Týsdag, 6. juni kl. 08:30.
Mánadag, 28. august kl. 08:30.
Mánadag, 2. oktobur kl. 08:30.
Mánadag , 6. november kl. 08:30.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 9. januar 2017 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Mánadag, 4. december kl. 08:30.
Fríggjardag , 29. december kl. 11:00.

**Býráðsfundir**

Mánadag, 9. januar kl. 17:00.
Mánadag, 13. februar kl. 17:00.
Mánadag 13. mars kl. 17:00.
Mánadag 10. apríl kl. 17:00.
Mánadag 8. mei kl. 17:00.
Mánadag 12. juni kl. 17:00.
Mánadag 14. august kl. 17:00
Mánadag, 11. september kl. 17:00.
Mánadag 9. oktobur kl. 17:00.
Mánadag, 13. november kl. 17:00.
Mánadag, 11. december kl. 17:00.
Fríggjadag 29. december kl. 12:00.

**Fíggjarnevndin, 5. januar 2016, pkt. 2:**

Fíggjarnevndin tók undir við uppskotinum um fundardagar fyri 2017.

## Avgerð

Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum hjá borgarstjóranum um fundardagar fyri 2017.

Býráðsfundir verða hildnir 2. mánadag í hvørjum mánaða. Fíggjarnevndarfundur verður hildin 1. mánadag í hvørjum mánaða - eina viku frammanundan býráðsfundinum - ímeðan aðrir nevndarfundir verða hildnir í vikuni áðrenn fíggjarnevndarfundin.

## Skjøl

- Uppskot frá borgarstjóranum til fíggjarnevndarfundir og býráðsfundir

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2017 |
| Fundardagur | 9. januar 2017 kl. 17:00-18:05 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.17.00-A00-4-16**

## 3. Støðutakan til skrivstovuhøli hjá Sernám í Suðuroynni

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin í Vági Dennis Holm við teldubrævið, dagfest 22. desember 2016, har hann heitir á kommununar í Suðuroynni um at taka undir við, at Sernám skiftir bústað frá Vágsvegi 89 (har Sernám hevði bústað frá stovnan inntil 1. apríl
2016) til Vágsveg 61 (SEV-húsið). Dennis Holm leggur afturat, at Sernám hevur í eitt tíðarskeið, uttan leigukostnað ella aðrar útreiðslur, havt fyribils skrivstovur á Vágsvegi 22. Fyri Tvøroyrar kommunu verður árliga gjaldið til skrivstovuhaldið hjá Sernám í Vági áleið kr. 34.000,-

Síðani niðurstøðuna hjá Býráðnum tann 31. desember 2016 hevur tað verið eitt skrivligt samskifti millum stjóran á Sernámi og kommunustjóran hjá Tvøroyrar kommunu. Í hesum samskifti er komið fram, at Sernám ynskir eina skjóta loysn áðrenn 1. februar í ár og at kommunurnar í Suðuroynni semjast um eina staðseting av skrivstovuhølinum. Um ikki ein loysn finst á staðsetingini áðrenn 1. februar verða journalirnar fluttar norðuraftur til høvuðsdeildina sambært stjóranum á Sernámi. Spurd, upplýsir stjórin á Sernámi, at tað fakliga er eingin munur á, hvar skrivstovuhølini liggja geografiskt í Suðuroynni.

**Býráðið, 31. desember 2016, pkt. 2:**

Býráðið mælir til, at høli til Sernám í Suðuroy verður staðsett á Tvøroyri, tí her er eitt fakligt umhvørvi frammanundan við Suðuroyar Barnaverndartænastu og tey skúlatilboð í Sernám's høpi, sum í løtuni eru staðsett í Vági og Tvøroyri, verða frá skúlaársbyrjan 2017 staðsett burturav á Tvøroyri. Harumframt eru tilboðini til barnaergoterapi og -fysioterapi staðsett á Suðuroyar Sjúkrahúsi á Tvøroyri.

Tí metir Býráðið, at omanfyri nevndu viðurskifti kunnu styrkja um tað fakliga umhvørvi og at bæði Suðuroyggin og Sernám fáa ágóðan av at fakliga umhvørvi verður savnað á einum staðið.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at býráðssamtyktin frá 31. desember 2016 stendur við.

### Skjøl

- Váttan frá Emmy Joensen í.s.v. bræv til Sernám viðvíkjandi skrivstovuhøli í Suðuroy.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2017 |
| Fundardagur | 9. januar 2017 kl. 17:00-18:05 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Bræv til Sernám viðvíkjandi skrivstovuhøli í Suðuroy.
- Bræv til Sernám viðvíkjandi skrivstovuhøli í Suðuroy.
- Bræv til Sernám viðv. skrivstovuhøli
- Bræv frá Sernámi til kommunurnar í Suðuroynni
- Svar frá borgarstjóranum á Tvøroyri í.s.v. hølum til Sernám
- Svar til Emmy Joensen í.s.v. bræv til Sernám viðvíkjandi skrivstovuhøli í Suðuroy.

**00.01.00-A00-15-16**

## 4. Val av limum í felags barnaverndarnevndina

### Málsfrágreiðing

Val av limum í nevndina hjá Suðuroyar Barnaverndartænastu.

Barbara Gram er spurd, og hon ynskir at halda áfram og umboða Tvøroyrar Býráð í felags nevndini fyri Suðuroyar Barnaverndartænastu í eitt valskeið afturat.

### Avgerð

Býráðið tekur undir við, at Barbara Gram heldur áfram sum fastur limur í barnaverndarnevndini og at Heidi Bech heldur áfram sum varalimur í barnaverndarnevndini.

**14.00.00-I04-1-17**

## 5. Kunningarfundur um tilbúgvingina og raksturin av Suðuroyar Sjúkrahúsið

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin og Ronnie Midjord, stjórin á Suðuroyar Sjúkrahúsið, hava avtala kunningarfund fyri nývaldu býráðslimunum um tilbúgvingina og raksturin av Suðuroyar Sjúkrahúsið. Kunningarfundurin verður hildin í starvsfólkabygninginum á Suðuroyar Sjúkrahúsið mikudagin tann 11. januar 2017 kl. 14:00.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2017 |
| Fundardagur | 9. januar 2017 kl. 17:00-18:05 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Býráðið tekur undir við, at fara á kunningarfund á Suðuroyar Sjúkrahúsið í ovurmorgin mikudagin tann 11. januar kl. 15:00, at fáa eina nærri kunning um viðurskifti kring tilbúgving og rakstur á sjúkrahúsinum.

### Skjøl

- Boð frá borgarstjóranum um kunningarfund fyri nývaldu býráðslimunum um tilbúgvingina og raksturin av

**20.00.00-I00-1-17**

## 6. Mentanarvirðisløn Landsins handað á Tvøroyri 25. januar 2017

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um, at Mentamálaráðið hevur fráboðað, at Mentanarvirðisløn Landsins verður handað á Seglloftinum á Tvøroyri tann 25. januar 2017. Tiltakið er alment og byrjar kl. 19:00.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2017 |
| Fundardagur | 9. januar 2017 kl. 17:00-18:05 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 18:05**

Kristin Michelsen

Kristina Kambskarð Sørensen

Alvi Mortensen

Bjarni Hammer



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 1/2017 |
| Fundardagur | 9. januar 2017 kl. 17:00-18:05 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen